# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tlf 3418xx

## - Guðs orð er ikki bannað í Svøríki!

**Ein av ræðumyndunum, ið hevur verið brúktur ímóti at broyta mannamunsgreinina til at umfata kynsligan samleika, er at í Svøríki verður greinin brúkt til at bannað Guðs orð, hetta er bara ikki veruleikin**

SAMKYND

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

- Ein prestur í Svøríki kann lesa alt upp úr Bibliuni, eisini brotini um samkynd, um hann hevur hug til tað. Hetta hevur mannamunsgreinin onga ávirkan á, sigur Søren Andersson pressutalsmaður hjá felagsskapinum hjá svenskum samkyndum RFFL.

- Tað einasta í mannamunsgreinini ger, er at nokta fólki at hetsa samkynd. Tað eru ávísir víðgongdir kristnir høgra felagsskapir, ið hava barst fyri rættinum at lýsa samkynd sum verri menniskju enn onnur. Tað er ivaleyst har, ið søgurnar koma frá, sum nú ganga í Føroyum um, at mannamunsgreinin hevur gjørt, at tú ikki sleppur at lesa upp úr Bibliuni í Svøríki. Men hetta er beinleiðis skeivt, slær Søren Andersson fast.

- Í stuttum ger mannamunsgreinin, at tú ikki kanst brúka Bibliuna til at leggja eftir minnilutum, og kalla teir fyri verri menniskju. Tú kanst t.d. heldur ikki brúka Bibliuna til at leggja eftir jødum, sjálvt um møguleikar eru fyri tí í sjálvum tekstinum, heldur Søren Andersson fram.

- Tað er eitt sera veikt argument, at rætturin at verja ein ávísan bólk móti kúgan og happing, skuldi skorið tín rætt til at trúgva uppá eina hægri megi. Tær nýtist ikki at niðurgera onnur fyri at praktisera tína trúgv. Men tað er ein sannroynd, at hetta hevur verið gjørt nógv. Við religión sum gassa hava nógvir bólkar verið diskrimineraðir. Hetta upplivdu við fyri 60-70 árum síðan við jødunum og fyri 40 árum síðan við kvinnum. Men hetta er nakað, sum vit í vesturheiminum, hava tikið avstand frá, sigur Søren Andersson og heldur fram:

- Eg havi luttikið á fundum í ST, sum partur av svensku sendinevndini, og argumentini, ið vit hoyra í hesum málinum, eru júst tey somu, ið summi lond brúka fyri at halda fæst í rættinum at kúga kvinnur.

# Kári aftur meistari á lítla pallinum



*Luttakarnir á singer/songwriter á Hotel Hafnia leygarkvøldið vóru Kári Páll, Evi, Heri og Holgar*

**Kári Páll Nolsøe gjørdi eitt sannførandi comeback í singer/songwriter, men villmaðurin og hinir báðir luttakararnir vóru ikki so at syfta**

TÓNLEIKUR

Ein ungur harri, ein ung dama, ein gamal rokkari og ein rættiligur villmaður traðkaðu fram á lítla pallinum í Hafnia Lounge leygarkvøldið.

Fýra ógvuliga ymiskir tónleikarar og fýra ógvuliga ymiskir persónar.

Aftur leygarkvøldið var fullsett í Hafnia Lounge. Tann góða uppmøtingin frá fólki vísir, at fólk hava tikið hendan tónleikastíl til sín, og tær ymsu persónligheitirnar tykjast bert at vera ein fyrimunur fyri tiltakið. Og leygarkvøldið var munur á luttakarunum í stíli, men dygdin varð varðveitt frá undanfarnum umførum.

### Tað unga

Yngra ættlarliðið leygarkvøldið var umboðað av 25 ára gamla Hera Trondesen og 21 ára gomlu Evi Isaksen. Heri hevur ferðast á føroyska tónleikapallinum í fleiri ár í bólkum sum Róp og S.c.a.t.G.o.h.

Evi Isaksen hevur ikki verið eins nógv at hoyrt, men hon hevur tó áður víst, at hon dugir at syngja, tá hon luttók í finaluni í Ársins songrødd.

Leygarkvøldið var tað sjón fyri søgn hjá øllum áhoyrarunum, at hon Evi veruliga dugir at syngja. Hon hevur ikki tær nógvu royndirnar við at spæla gittar, og tað merkti eisini hennara framførslu.

Tað bilaði ikki við gittarspælinum hjá Hera Trondesen. Hann er ikki ein persónur, sum ger nógv av sær sjálvum á pallinum, men tónleikurin sigur eina sannførandi søgu. Við sínari djúpu og kraftmiklu rødd sló hann fast, at hann eisini kann gera seg galdandi í singer/songwriter høpi.

Somuleiðis hevur Evi Isaksen onga orsøk til at halda seg aftur. Hennara framførsla var rólig og góð, og hon hvíldi í síni framúr rødd. Tað vóru kanska royndirnar og tónlistarliga búningin, sum manglaði hjá teimum báðum yngru luttakarunum leygarkvøldið. Men teirra avrik góvu so avgjørt áhoyrarunum og dómarum eitt gott upplivilsi.

### Tað eldra

Við sínum 34 árum flokka vit Kára Páll Nolsøe í eldra aldursbólkinum saman við villmanninum Holgar Jacobsen.

Villmaðurin boðaði frá sínari luttøku umvegis heimasíðuna hjá villmonnum, og hann vildi ikki gera aðrar viðmerkingar undan kappingini.

Holgar hevði eina spennandi rødd av tekstum við sær í skjáttuni. Hann var ikki bangin fyri at vera samfelagsrevsandi. Hann var ikki so villur sum onkuntíð áður, men tó sást á øllum brøgdum, at hann hevði verið á palli áður.

Kári Páll Nolsøe var í finaluni fyri tveimum árum síðani. Og tað var sera gleðiligt at hoyra, at hann framvegis spælir sum á sínar heilt egnu tangentar. Hann spældi so væl leygarkvøldið, at hann gjørdist vinnari og sleppur at hitta Jensinu Olsen og Høgna Reistrup í finaluni komandi vikuskifti.

Framførslan hjá Kára var rá, ópolerað og sveimandi og sjarmerandi alt í senn. Ein sterkur tónleikari, sum, hóast ikki langt framman fyri hini, vann við hegni og dugnasemi.

Leygarkvøldið 11. november verður finalan í singer/songwriter 2006, og tað er framman undan finaluni ómøguligt at peika á nakran favoritt.

Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2007 er týsdagin 6. nov. 2006




**Í mars 2007 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.**

**Hvítu síður**

Týsdagin 7. november 2006 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu síður í Telefonbókini fyri ár 2007 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 565 í Telefonbókini 2006, og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.000,00 (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 6. november 2006 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ........ kr. 900,00
(B) Innramming ........ kr. 1.000,00
(E) Grafisk lýsing fyri mm (min. 30 mm) ....... kr. 30,00
(sí dømi á s. 564 í Telefonbókini 2006)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 600,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.400,00.
Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 564 í telefonbókini 2006, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo FØROYA TELE